Ov lítið vatn til eldsbruna á Selatrað

ELDSBRUNI
Ingrid Bjarnastein

Týsnáttina beint eftir midnátt varð boðað frá eldsbruna á politistøðini í Runavík.

Eldur var komin í eini bilhús á Selatrað. Orsøkin til eldsbrunan er ikki greið enn, men málið verður kannað, sigur vakthavandi á politistøðini í Runavík.

Eingin veit, hvat kann vera hent. Eigararnir høvdu verið í bilhúsinum ein tíma frammanundan, og tá var alt í lagi.

Tað vóru trupulleikar við at sløkkja eldin, tí tað var ov lítið av vatni á Selatrað. Tí noyddust bilar at koma úr Runavík og Søldafirði við vatni, og tað tekur jú langa tíð. Úrslitið varð, at alt bilhúsið brendi í grund, og harumframt fóru tvær frystiboksir fullar av kjøti frá slaktinum í heyst fyri skeytið.

Føroyingur sýnir fram list í Odense

Hanni Bjartalíð sýnir í hesum døgum fram málningar í Odense

LIST
Ingrid Bjarnastein

Í Odense er latin upp í Gallerie Rasmus framsýning við føroyskum listamanni.

Tað er klaksvíkingurin Hanni Bjartalíð, ið sýnir fram málningar á lørifti og papír, umframt grafikk.

Umframt at mála arbeiðir Hanni Bjartalíð við myndum til eina føroyska barnabók. Ein krevjandi, men spennandi uppgáva, sum hann roknar við fer at ávirka hansara málningar í framtíðini.

Høvuðspersónarnir á myndunum kunnu vera alt frá dukkum og maskum til einglar, hundar, esil, kryplar og prins Charles.

Handlingin kann fevna um eina dagligdagsmynd ella ein maskeradenat í Klaksvík, har dagsins veruleiki verður blandaður saman við gátuføri – eitt stað har alt kann henda.

Framsýningin byrjaði fríggjadagin 26. oktober, og møguleiki er at síggja málningarnar hjá Hanna Bjartalíð heilt fram til leygardagin 24. novemb-er.

Jørgen Niclassen misbrúkar sítt politiska vald

-Tað er púra burturvið at flyta Skipasýnið vestur í Vágar, og hvat billar landsstýrismaðurin sær inn at mistonkiliggera tey, sum arbeiða á Skipasýninum og skipasmiðjurnar sigur stjórin á Tórshavnar Skipasmiðju, Poul Mohr.

Poul Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju heldur, at løgmaður beinanvegin átti at steðgað ætlanini hjá landsstýrismanni sínum at flyta Skipasýnið til Vágar.

ALMENNIR STOVNAR ÚT Á BYGD
Jan Müller

Tað, sum hevur fingið bikarið at flóta yvir hjá skipasmiðjustjóranum, eru úttalilsini hjá Jørgen Niclassen, landsstýrismanni í Fregnum í farnu viku, sum lættliga kunnu tulkast sum at ein mistonkiliggerðan av fólkunum, ið arbeiða hjá Skipasýninum og á skipasmiðjunum, har Skipasýnið ger stóran part av sínum arbeiði.

Orðini hjá Jørgen Niclassen í Fregnum, vórðu hesi:

"Til ber kortini at síggja ein fyrimun við ikki at leggja skipaeftirlitið í Miðsteðarøkið, og hann er, at stovnurin sleppur undan, at ov tætt samband er við skipasmiðjurnar". Og aðrastaðni í greinini stendur: "Fyri tað fyrsta arbeiðir Skipaeftirlitið um alt landið og ikki bara á skipasmiðjum. Í øðrum lagi kunnu skipaeftirlitsfólk koma undir trýst, um persónliga sambandið verður ov nógv."

- Eg havi ikki hoyrt nakað líknandi. Hvat billar maðurin sær inn at mistonkiligera bæði tey á skipaeftirlitinum og okkum, sum arbeiða á skipasmiðjunum, sigur Poul Mohr, sum varð ovfarin tá hann læs samrøðuna í Fregnum. Tað fyrsta, ið rann sær til hugs, var, at tann, sum ilt hugsar, hann ilt ger. Poul Mohr spyr annars, hvat landsstýrismaðurin meinar við, tá hann sær ein fyrimun ikki at leggja Skipasýnið ov tætt upp at skipasmiðjunum. - Man skuldi trúð, at tað var ein aðaltátturin hjá einum ráðharra at samskipa samfelagið soleiðis, at tað virkaði sum best. Og í hesum førum virkar tað best, tá Skipasýnið liggur sum tað ger í dag, nevniliga tætt upp at skipasmiðjunum.

Poul Mohr heldur tað tí vera so dundrandi skeivt at leggja ein slíkan stovn sum Skipasýnið uttan fyri Miðsteðarøki og serstakliga uttan fyri Havnina, har hann hevur ligið síðani hann varð til. - Tað sær út sum, at hvørja ferð ein nýggjur ráðharri kemur ella fer úr starvi, so dregur hann ein stovn við sær. Tað kann ikki vera meiningin. Er tað meiningin við yvirtøkunum, so skilji eg einki av tí heila.

Við allari virðing fyri vágamonnum heldur Poul Mohr tó, at henda flytingin av Skipasýninum til Vágar bert hevur eitt endamál, og tað er at skaffa atkvøður til Jørgen Niclasen.

Poul Mohr heldur, at løgmaður átti at áttalað hetta alt fyri eitt. Tí hetta er so avgjørt ikki at í tráð við politikkin hjá eitt nú løgmanni um at gera samfelagið meira rationelt.

- Men tað er politikkurin at leggja almennar stovnar úti um landið. Hví tá ikki leggja Skipasýnið í Vágum?

- Eg gangi út frá, at teir, ið arbeiða á Skipasýninum í dag vilja búgva í Havn framhaldandi og koma tá eisini at gjalda skatt her. So har fær man ikki fatur í skattapengunum. Eg havi einki ímóti at leggja stovnar úti um landið, men man má ikki gera tað truplari at arbeiða í samfelagnum fyri tað. Teir stovnar, sum hava eina so stóra tænastufunktión sum t.d. Skipasýnið, mugu ikki flytast á henda hátt.

Skipasmiðjustjórin heldur, at tað kundi verið áhugavert at vita, um landsstýrismaðurin í heila takið hevur spurt fólkini, ið arbeiða við hesum uppgávum, hvat tey halda og hevur hann kannað, hvar uppgávurnar liggja! -Eg eri vísur í, at millum 80 og 90% av uppgávunum liggja há skipasmiðjunum í miðsteðarøkinum tvs. í Havn, á Skálafjørðingum og síðani í Klaksvík.

Poul Mohr vísir annars á, at skrivstovurnar hjá Klassanum liggja beint við skipasmiðjurnar í Havn og á Skála.

Hann skýrir viðgerðina hjá landsstýrismanninum av hesum máli sum misbrúk av politiskari makt.

Útróðrarmenn sunnanfjørðs noyddir at selja fyri spottprís

Tað er sera ymiskt, hvat útróðrarmenn ymsarstaðir í landinum fáa, tá teir selja á Fiskamarknaði Føroya. Útróðrarmenn í Suðuroynni hava dagliga tann trupulleika, at boðið verður ikki uppá fiskin og verður hann tí seldur fyri ein prís, ið er nógvar krónur lægri, enn útróðrarmenn aðrastaðni fáa. Á endaligu ársuppgerðini er talan um nógvar pengar. Kanka flutningsmøguleikarni r eru ein orsøk, tí tað ganga lættliga 90 tímar hjá keypara norðanfjørðs at fáa fiskin úr Suðuroynni

At tað kann taka einar 90 tímar at fáa fisk úr Suðuroynni til keypara norðanfjørðs, meta útróðrarmenn kann vera ein orsøk til, at fiskakeyparar aftra seg við at keypa fisk úr Suðuroynni. Til sammetingar verður nevnt, at tað tekur fiskibáti 50 tímar at fara til Scrabster at selja - aftur og fram - og at sluppir hava havt 30 tímar niður á marknaðin

Tilvildarlig mynd

FISKASØLA
Dagfinn Olsen

- At prísmunurin er so stórur ger, at ein missir hugin at fáast við hetta.

So greiðar eru útmeldingarnar, tá ein kemur á tal við útróðrarmenn í Vági. Útróðrarmenn í Suðuroynni hava ásannað, at keyparar hava ikki sama áhuga í teirra fiski, sum í fiski aðrastaðni í landinum. Men samstundis eru teir greiðir yvir, at tað er ikki góðskan á fiskinum, ið er orsøkin.

Fiskamarknaður Føroya á Toftum hevur eisini deildir í Sørvági og í Vági. Sølan fer fram soleiðis, at fiskimenninir, seljararnir, seta sjálvir ein minstaprís á. Síðani koma keypararnir inn í myndina og bjóða upp á fiskin. Tað hevur víst seg, at rættiliga stórur prísmunur er á, tá tað snýr seg um tey ymsu støðini í landinum, tí tað er ymiskt, hvar keyparar hava áhuga at keypa.

Spottprísur í Suðuroynni

Hyggur ein at sølutølunum, prísunum, og ger samanberingar, so finna eyguni skjótt munin. Tí munurin er ikki at fara skeivur av.

Hyggur ein at tølunum hjá útróðrarmonnum í Vági ein tilvildarligan fríggjadag, so er eyðsæð, at munur er á.

Hýsa 1 sæst t.d. fara fyri 10 krónur í einum stað og fyri 19 krónur annað stað. Og munurin er rættiliga gjøgnumgangandi, um ein hyggur søluseðlar ígjøgnum.

Tað mesta, ið selt verður í Vági, er júst hýsa.

- Tað er mest hýsa, ið fer til útflutnings, men eisini toskaprísurin er einar 4 krónur lægri í miðal, sigur ein av útróðrarmonnunum í Vági, Bjarni Brattaberg.

- Hetta, og at eini 10 krónur eru á muni á hýsu ger, at menn missa hugin at fáast við útróður, sigur Bjarni, sum vit hitta í stovu hansara í Vági til eitt prátt um truplu støðuna.

Orsøkin til prísmunin er ógreið, men staðfestast kann, at tað verður boðið minni uppá fisk úr Vági, enn upp á fisk aðrastaðni.

Tosar ein við útróðrarmenn, so skilst, at tað í síðsta enda eru rættiliga stórar upphæddir, ið hetta snýr seg um. Talan kann verða um eini 80.000 krónur, tá gjørt verður upp.

Bjarni Brattaberg sigur, at hóast menn hava spurt seg fyri ymsastaðni, so fáa teir einki svar ella ymsar útmeldingar.

- Men ynskiligt er at fáa eitt kjak í lag um hví støðan er sum hon er, sigur Bjarni Brattaberg.

Hann sigur, at menn hava tosað leingi um hetta sínámillum, men annars hava teir tagt við hesum. Men nú er kanska tíð uppá at fáa hetta fram.

95 tímar til keyparan

Nú tosað verður nógv um farleiðina til Suðuroyar, hava útróðrarmenn í Vági hug at koma við einum íkasti til kjakið.

Teir meta, at truplu umstøðurnar hesum viðvíkjandi eru ein orsøk til, at fiskakeyparar norðanfjørðs aftra seg við at keypa fisk úr Suðuroynni.

- Tað er so, at keypur t.d. ein fiskakeypari í Leirvík fisk úr Vági ein fríggjadag, so hevur hann ikki fiskin fyrr enn týsdag. Sostatt hevur fiskur einar 90 -95 tímar at koma fram til keyparan, sigur Bjarni Brattaberg.

Til sammetingar vísir hann á, at hann hevur verið við fiskiskipi í Scrabster og selt og tók hetta 50 tímar aftur og fram. Dømi er eisini um, at sluppir hava havt 30 tímar niður á marknaðin.

Truplu umstøðurnar og ørkymlandi inntøkumøguleikarnir hjá útróðrarmonnum í Vági hava nú fingið teir at koma fram við hesum, hóast trupulleikin ikki er nýggjur. Teir vóna at fáa eitt svar uppá, hví støðan er sum hon er. Og teir vóna, at eitt kjak kann fáast ílag um hetta.

Tað kann ikki vera so nógv øðrvísi at búgva í Suðuroynni, enn aðrastaðni, tykist vera niðurstøðan hjá teimum í Suðuroynni, ið fáa úrtøku sína úr sjónum.

Tungu korini seta hugsanirnar í gongd og víst verður á, at øll gjalda tað sama í landskassan og at hóast ikki tað sama fæst fyri vøru úr Suðuroynni, so kosta aðrar vørur ikki minni at keypa í oynni.

Hóast fólk eru glað fyri at vera í oynni og trívast við sínum starvi, so skulu sterkar herðar til at bera, at sølutølini dagliga bera boð um vantandi sølumøguleikar.

- Hetta er ikki hugaligt. Hetta ger, at ein tímir ikki at fáast við hetta meira, sigur Bjarni Brattaberg og skoðar út á fjørðin við kaffikoppinum í hondini, meðan vónin um útróðrarveður verður havd á lofti, meðan gráu fylgiseðlarnir á borðinum minna á, at vónirnar um góðar søluprísir fyri útróðrarfiskin eru smá-ar.

Í starvsvenjing umborð á Norrønu

STARVSVENJING
Annika Joensen

Hósdagin 25. oktober klokkan 24.01, fór Norrøna avstað við seks næmingum úr Runavíkar og Vestmanna Skúla. Næmingarnir vóru við, tí tey hava øll valt Norrønu sum starvsvenjingarpláss. Tey hava øll verið umborð síðani mánadagin, og dámar teimum heilt væl.

Grundin til at tey hava valt at fara umborð á Norrønu í starvsvenjing er, at tey vildu royna okkurt nýtt, og so halda tey tað eisini vera sera spennandi at sleppa uttanlanda.

Tað fyrsta tú leggur merki til, tá tú sært tey seks saman er, hvussu gott tey hava tað saman. Tey sita og fjasa og flenna, men eru eisini álvarsom tá ið tey skulu.

Beint nú hava tey eina stutta pausu, har tey kunnu hvíla seg inni í messuni, men annars eru tey í gongd allan dagin. Genturnar vaska og dustsúgva kømurni; tey vaska vindeygu og trappur. Tær gera eisini mat til øll fólkini umborð, taka av borðinum og gera smyrjibreyð til matstovuna.

Dreingirnir eru dekkarar. Teir hava til dømis hugt allar bjargingarbátarnar ígjøgnum, fyri at vita um matur og vatn og ymiskt annað er sum tað eigur at vera. Teir hava eisini gjørt ymiskt annað á dekkinum, so alt er klárt tá Norrøna fer avstað til Danmarkar.

Tá ið ferðafólk koma umborð, fáa næminganir ymiskar aðrar uppgávur. Genturnar skulu til dømis verða í matstovuni og taka av borðinum og eisini verða í køkinum og gera mat til ferðafólkini. Tær skulu harumframt eisini vera í messuni onkran dag og gera mat til arbeiðsfólkini.

Norrøna kemur til Danmarkar leygardagin 27. oktober. Tá hon hevur sett ferðfólkini av, fer hon víðari til Frederica, har hon verður liggandi til mánadagin, tí har er okkurt smáting, ið skal gerast.

Um tíð er, sleppa næmingarnir í land ímeðan tey eru í Frederica. Tey fáa 2-4 tímar har tey kunnu gera tað tey vilja. Tá spurt verður hvat tey ætla sær at gera, um tey fáa frí, svara genturnar, at tær ætla sær at keypa klæðir. Dreingirnir vita enn ikki, hvat teir ætla sær, men tað skal verða okkurt stuttligt ,siga teir.

Tilsamans verður Norrøna í Danmark í 7 dagar. Hon kemur aftur hósdag í næstu viku og fer eisini avstað aftur sama dag. Tann túrin fara næmingarnir eisini við.

- Okkum dámar sera væl at vera umborð. Tað er ógvuliga stuttligt og spennandi at royna tey ymisku tingini, og fólk eru ógvuligani fitt, siga næmingarnir. Ein av teimum vil vera við, at tað er gott at sleppa undan skúlanum og vera burtur frá heiminum í eina tíð, og hini nikka játtandi, men øll eru tó samd um, at tað verður gott at sleppa heim aftur.